

Myndir: Jens Kristian Vang

# Loystar forðingar

**Teldupostsamrøða við Hans Tórgarð um leiklutin sum Krypilin í leikinum "Krypilin frá Inishmaan" hjá Grímu á Gamla Meiarínum undir leikstjórn Eyðun Johannessens**



*Birgir Kruse*

*Hvussu hevur tú »latið teg í« leiklutin sum Halti-Billy, ella bert Billy? Nakran ávísan framferðarhátt, ella inspiratiónskeldu?*

Hetta er ein av teimum meira krevjandi leiklutunum. Tað krevur eitt rættiliga stórt kroppsligt arbeiði at gera ein sonevndan "krypil". Ávísir musklar og liðir eru undir hørðum trýsti, og mugu venjast. Afturat tí kemur so røddin, og annars tað vanliga karakterarbeiðið: Hvør er hann, hvat ger hann, hví ger hann tað sum hann ger, hví ger hann tað soleiðis, o.s.fr. Í leikritinum stendur so at siga onki um, á hvønn hátt Billy er brekaður. Hann haltar. Tað er alt, sum sjónleikarin fær at vita frá høvundanum. So restin er upp til ein sjálvan. Eg royndi so m.a. at lesa meg fram til okkurt serstakt brek, sum Billy kundi hava, men fann so útav, at tað kanska var best at lata hugflogið ráða - royna at vera so lítið "spesifikkur" sum gjørligt. Høvuðssakin er, at Billy er brekaður - ikki hvørjum brekið hann líður av. At gera ella mynda ein brekaðan persón er ofta ein spurningur um at gera forðingar fyri ein sjálvan og so royna at loysa tær. Í fyrstani hevði eg ætlað mær at gjørt hann bara lamnan í øðrum beininum og kanska øðrum arminum. Men tað vísti seg skjótt, at hetta var nakað smáligt: Hann verður róptur "krypil", so tað ljóðar av eitt sindur meira. Og tað er so spakuliga vaksið fram undir venjingum - bæði teimum venjingum, vit gera saman á palli, og tað arbeiðið sum eg sjálvur havi gjørt við síðuna av.

Ávirkanin, ella íblásturin, kemur annars úr umhvørvinum - fólk á gøtuni, sjónvarpi, bókum, o.s.fr. Eisini havi eg fingið eitt sindur av "kunstigari" hjálp. M.a. eina kúlu á ryggin av gipsi, sum hjálpir til at geva mær ein serligan kroppsburð, og — handilstenn — eitt gebiss at seta uttaná mínar egnu tenn, sum bæði broytir andlitið, andlitsrørslurnar og røddina. So tað liggur rættiliga nógv aftanfyri ein tílíkan persón. Ikki tí, eg ivist ikki í at minni kundi gjørt tað - men tað er stuttligari, bæði hjá leikaranum og áskoðarunum, at fáa okkurt eyka.

*Hvussu er at "lata seg úr aftur" hesum leikluti?*

Tá ið leikluturin er komin so at siga inn í kroppin, er tað skjótt at bæði fara úr honum og fara í hann. Kroppurin hevur vant seg við ein nýggjan "verumáta", og innstillar seg beinanvegin.

*Tú kemur úr einum húsum, har fleiri hava valt sjónleik sum lívsleið, so ella so. Hvør er orsøkin? Er hon innanhýsis ella úr Kvíkstúni?*

Eg veit ikki. Og eg havi ongantíð hugsað nakað serligt um tað heldur.

*Hvør var fyrsti leiklutur, tú spældi?*

Tað var Klintrimús í "Dýrini í Valbakkaskógi", sum vit gjørdu í skúlanum í Kvívík tá eg var eini tíggju-ellivu ár. Systir mín Ria var leikstjóri.

*Hvør eggjaði tær - fremst av øllum - at gerast sjónleikari?*

Ongin, sum eg kann minnast.

*Á heimasíðuni hjá Grímu sæst, at tú hevur havt ein heilan hóp av leiklutum. Ógvuliga ymiskir eisini. Er nakar av hesum, sum á einhvønn hátt skilja seg burturúr, tá tú lítir aftur á teir? Antin strævnir ella gleðiligir?*

Allir skilja seg burturúr á sín hátt. Allir hava (ella høvdu) sítt egna lív. Summir strævnari enn aðrir, summir keðiligari og summir gleðiligari. Eg veit ikki, um eg kann taka nakran framum - tað hevði næstan verið at gjørt mismun. Tað, sum tú minnist sum nakað framúr, hevur sum oftast nakað við sjálvan leikin, søguna í leikinum at gera, heldur enn leiklutin. Men einmansleikir eru nakað fyri seg: Tað er nógv einsamallari enn annars. Eg havi gjørt tveir einmansleikir við stuttum millumbili, og tað verður nokk ein góð løta áðrenn tann næsta.

*Tú ert yngsti limur í Grímu, føddur í 1969, men samstundis hin einasti sjónleikarin, sum kann prýða seg við heitinum "mag.art.". Hvussu hongur tað saman?*

Tað er sera einfalt: Skúlin, sum eg gekk á, Teaterhögskolan i Helsingfors, er ein partur av Helsingfors Universitet, mest av fyrisitingarligum og fíggjarligum orsøkum. Og á einum universitetið taka næmingarnir vanliga eina akademiska útbúgving, ella grad. Annars er Teaterhögskolan einasti sjónleikaraskúli í norðurlondum sum kann bjóða næmingunum eina slíka útbúgving.



*– At gera ella mynda ein brekaðan persón er ofta ein spurningur um at gera forðingar fyri ein sjálvan, og so royna at loysa tær*



*Í skránni fyri aktuella leikin verður sagt, at frá í ár er Gríma ikki longur ein yrkisleikbólkur, men eitt leikhús. Hvat vil tað siga?*

Fyrst og fremst: Áherðslan skal liggja á -bólkur og -hús! Og tað er so at siga einasti munurin: Bólkurin hevur fingið eitt hús at vera í! Gríma hevur síðani byrjanina onki fast innivist havt. Men so í '93 fingu vit innivist í niðaru hæddini á gomlu Margarinfabrikkini, og í '98 fingu vit sýningarhøli á gamla Meiarínum, og so í ár gjørdu vit av at umskipa bólkin til eitt leikhús.

Hetta førir sum so ongar broytingar við sær - annað enn at fólk vita, hvar Gríma heldur til nú; innihaldið er enn tað sama. Fólkini eru tey somu, valið av leikum er tað sama. Vit hava bara betri møguleikar nú, sleppa undan at læna hús, og kunnu sjálvi avgera nær vit spæla, og hvussu leingi vit spæla. Vit eru eisini í ferð við so smátt at keypa útgerð til húsið; hava beint nú investerað í eitt nýtt ljósannlegg, nýggj teppi, og - ein gleðilig nýggjheit til tey flestu, sum hava verið til tiltøk á Meiarínum: Vit eru í ferð við at keypa nýggjar stólar!!

*Tað verður gott fyri endan. Men hvussu eru sjónleikarar annars skipaðir í Føroyum?*

Sjónleikarar í Føroyum eru skipaðir í tvey meginfeløg: Áhugaleikararnir í Meginfelag áhugaleikarafelag Føroya, og yrkisleikararnir í Leikarafelag Føroya, sum taka sær av áhugamálum hjá teimum báðum bólkunum. Yrkisleikararnir í Føroyum eru jú øgiliga fáir - tað er, sum er, bara Grímuleikararnir! Leikarafelagið hevur tí bara til uppgávu at umsita játtanina frá Leikpalli Føroya til yrkissjónleik í Føroyum, og at reka leikhúsið Gríma. Vit hava leingi havt ætlanir um at umskipa Leikarafelagið til eitt fakfelag, men sum er nú ber hetta ikki til.

*...og tær fíggjarligu vánirnar? Hvussu eru tær og hvat heldur tú um tær?*

Tær fíggjarligu vánirnar kundu verið betri. Vit hava sum er ráð til tvær uppsetingar um árið, um báðar halda seg til eitt minimum av leikarum, pallútgerð, o.s.fr. Tey seinastu árini hevur bara ein sýning hvørt ár verið budgettløgd - restin er sjálvboðið arbeiðið, sum leikararnir átaka sær fyri at tjena eitt sindur eyka.

*Aftur til "Krypilin úr Inishmaan". Í forhondsumrøðuni og í skránni eisini verða filmsleikstjórar sum Tarantino og Scorsese nevndir. Kennir tú tað, sum tú flytir hesar leikstjórar - við respekt fyri Eyðuni, sjálvandi - um scenukantin, tá áskoðarar møta til sýning á Gamla Meiarínum? Altso eitt serligt Tarantino/Scorsese útrykk?*

Hesir leikstjórar hava so at siga, uppfunnið nýggj úttrykk, ella úttrykkshættir. Scorsese var vanur at lata leikararnar improvisera fleiri scenur undir upptøkunum, fyri at fáa eitt livandi og lætt mál, tingini henda á staðnum, beint her og nú. Tarantino hevur lagt seg eftir at skriva á sama hátt: Persónarnir tosa sum um tað teir siga kemur beint úr høvdinum á teimum, beint her og nú. Og Martin McDonagh ger tað sama. Hetta førir til langar samrøður, sum í fyrstani tykjast at snúgva seg um onki! Eitt dømi úr leikinum er ein scena uppá einar fýra-fimm minuttir, har ein persónur stendur í handlinum og tosar um bomm - og harafturat um bomm, sum ikki eru at fáa í handlinum! Tað kann tykjast tómt og einkisigandi, men tað gevur persónunum lív, og fær áskoðaran (um alt gongur sum tað skal) at gloyma, at hetta eru fiktiv menniskju, hann hyggur at. Hann fer at síggja persónarnar annarleiðis, ikki sum fjarar verur á einum palli, sum úr eini fjarstøðu skulu lýsa okkum vanligu menniskju, men ístaðin júst sum vanlig, gerandislig menniskju. Tá tað so hendir hesum fólkunum okkurt, verður styrkin í tí nógv størri - tað hendir beint her og nú, og tað hendir fyri eitt "almindeligt" fólk, sum kundi verið tú ella eg.

*Hvat heldur tú annars um viðurskiftini millum film og sjónleik? Kunnu hesar listagreinar læra nakað av hvørji aðrari, ella útilokað tær hvørja aðra?*

Tú hoyrir ofta fólk siga, at ein pallsjónleikari kann ikki brúkast á filmi, og umvent, ein filmssjónleikari er ómøguligur á palli. Tað er nú ikki so einfalt. Ein skal ansa eftir ikki at blanda saman tað úttrykkið, sum sjónleikarin gevur á pallinum, ella løriftinum, við handverkaran sum stendur aftanfyri. Karakterurin og leikarin eru ikki sami persónur. Ein pallkarakterur riggar ikki á filmi. Hann er ógvisligari enn neyðugt, hann hevur kanska tjúkka sminku á sær, sum sæst langan veg, hann rópar ov hart. Og umvent: Ein filmskarakterur á palli hoyrist ikki, ongin sær hansara andlitsrørslur langt burturfrá, og hann fellur inn í bakgrundina. Hesir munirnir eru tó eisini so smátt við at hvørva. Vit hava á pallinum, langt um leingi, lært okkum at minka um úttrykkið um tað er neyðugt. Tildømis ber væl til at teska heilt spakuliga á Meiarínum, og kortini hoyrast á aftasta bonki. Og um tú veitst at tað ber til, so er eisini møguligt at brúka tað, um leikurin krevur tað. Tildømis er tað upplagt í "Kryplinum" at tosa heilt vanligt, við tann persónin sum situr undir liðini á tær, uttan at hugsa um at røddin og rørslan skal so langt út. Tað hoyrist og sæst kortini, tá avstandurin er so lítil. Men hetta er ikki bara sum at siga tað: Vit eru von við ein ávísan "pall-teknikk", sum kann verða ringur at sleppa frá. Tað krevur arbeiði.

Eisini eru fleiri filmsleikstjórar, sum leita eftir einum stórum og ógvisligum, ella teatralskum, úttrykkið, t.d. Peter Greenaway í "The Baby of Macan". Og leikhøvundar brúka eisini filmin sum beinleiðis úttrykshátt í leikum. Eg kann t.d. nevna tað scenuna í "Kryplinum", har ein filmur verður vístur á løriftið á bakveggium, meðan leikararnir sita frammanfyri, við bakinum til áskoðaran og kommentera filmin. Hvat er tað tá, sum er høvuðsúttrykkið? Men sjálvandi er enn langt ímillum hesar báðar úttrykkshættirnir, filmin og pallsjónleikin. Tað eru fleiri størri munir í sjálvum frásøguháttinum, og myndamálinum t.d. Men so leingi fólk eru opin fyri íblástri alla staðni frá, so ber til at læra av hvørjum øðrum.

*Tá ein er atfinningarsamur - sum ein rættur føroyingur - og einki hevur at finnast at, so er MÁLIÐ altíð eitt takksamt stríðsevni. Saman við Eyðuni Johannessen hevur tú umsett leikin. Hví hava tit valt eitt orðalag, har tit ikki smæðast fyri danismum og eitt nú siga "rolla" ístaðin fyri "leiklutur"?*

"Rolla" og "leiklutur"?? Eg helt tú fórt at finna okkurt nógv verri dømi enn tað...Hetta hongur sjálvandi eisini saman við úttryksháttinum, frásøguháttinum í júst hesum leikinum. Tað er tað fyrsta, ein skal hugsa um sum týðari: At laga seg eftir upprunahandritinum, og ikki skriva sítt egna. Shakespeare skal týðast á ein hátt, og McDonagh á ein annan. Fólkini vit sígga í "Kryplinum" skulu helst vera vanligir, gerandisligir persónar, og tað teir tosa um, letur seg ikki siga á bókmálið. So høvdu teir beinanvegin blivið "fiktivir" aftur, óveruligir. Hjá okkum í Føroyum er tað tíverri so, at talumálið er eitt "danismumál", og tað noyðist ein so at laga seg eftir sum týðari. Hesin leikurin er harafturat upprunaliga skrivaður á dialekt, og tað noyðist týðarin so eisini at minnast til. Og so skal ein eisini ansa sær við 1934: Hóast leikurin sigst at ganga fyri seg tá, so er hann skrivaður í 1997, og hann er meira merktur av einum hálvfemsara-hugsunarhátti enn einum tríatiára-hugsunarhátti.

*Hondina á hjarta - hevði tú nakrantíð filmin um "Barbu" í huganum, tá tit vandu?*

Nei, aldrin í lívinum.... Hvussu kundi tú koma uppá tann tankan???? Eg havi hoyrt onkustaðni at man kann ikki vera ironiskur í mail-formi. So eg má heldur svara ordiligt aftur: "Barbara" var ein av orsøkunum til at vit valdu hendan leikin.

*Hvat verður næsta tiltakið, tú verður við í?*

Ja, tað er ikki minni spennandi: Tað verður ein nýskrivaður føroyskur leikur: "Eitur nakað land Week-end" eftir Jóanes Nielsen, sum vann leikritakappingina hjá Leikpalli Føroya í august. Hann fer at hava heims-frumsýning um miðjan marts.

*.....og altso ikki ein ferð til Inishmaan? Hevði tú havt hug til tað?*

Ferð og ferð, er tað ein charter-ferð, so nei takk. Men eg kundi so sanniliga hugsað mær ein túr til Inishmaan, tað er heilt vist. Ella Írland yvirhøvur. Eg havi ongantíð verið í Írlandi, og tað stendur ovarliga á ynskilistanum.

*Næsta ár verður Listahátíð í Føroyum. Hvat kundi tú hugsað tær stóð á skránni?*

Tað er lætt at verða isoleraður í Føroyum, og vit hava tí hart brúk fyri at sleppa at síggja sjónleik úr øðrum londum av og á. Og ikki bara úr hinum norðanlondunum. Eg vóni at Listahátíðin fer at gera tað møguligt at fáa sjónleikabólkar aðrastaðni frá henda vegin. Nakað serligt ynski...? Tjað, eystureuropa er rættiliga spennandi beint nú. T.d. hevur ein litavisk uppseting av "Hamlet" gingið um meginpartin av Europa tey seinastu árini. Tað hevði ikki verið so galið at fingið hana hendavegin.

*Eg takki og loggi av. Bei.*

birk@post.olivant.fo